# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Jákup hugsar ikki um landsliðið

**Skaðin hjá Gunnari Nielsen tykist gera spurningin um málmansplássið á landsliðnum óneyðugan, men Jákup Mikkelsen sigur seg als ikki hava tikið støðu til, um hann til reiðar at taka enn eitt tørn**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Jákup Mikkelsen hevur spælt 61 landsdystir fyri Føroyar. Møguleikin er helst til staðar at økja um hetta talið, men enn hevur klaksvíkingurin ikki tikið støðu til tann møguleikan*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

2009 skuldi eftir ætlan vera árið, har Jákup Mikkelsen spældi sínar seinastu landsdystir fyri Føroyar.

Eftir dystin móti Litava í fjør heyst hugsaði landsliðsveteranurin um støðuna, og svarið var, at hann var til reiðar at taka eitt ár afturat á landsliðnum, sum hann hevur verið partur av, síðani Føroyar fyri 21 árum síðani komu á altjóða fótbóltskortið.

Støðan broyttist tó í vár, tá Heðin Askham við einum blaðungum og óroyndum landsliðið fór til Íslands.

Nýggja landsliðið vann dystin móti Íslandi, men í upptaktini til dystin snúið tosið seg fyrst og fremst um, um tað var rætt av fyribils setta venjaranum at vraka Jákup Mikkelsen. Hesin fekk tá at vita, at hann ikki longur var fyrsta val millum stólparnar, og tí valdi Jákup at boða frá, at hann gavst á landsliðnum.

Seinni var útsøgnin modererað nakað, tá Jákup Mikkelsen segði, at var støðan tann, at Heðin Askham bara var fyribils settur, so talan var um nýggja støðu, tá nýggjur venjari stóð við stýrisvølin. Tað er hesa støðu, Jákup Mikkelsen nú skal umhugsa.

### Avsluttað kapitul

Brian Kerr tóktist annars ikki vera í iva í samrøðu, sum varð prentað í Sosialin í gjár.

– Gunnar Nielsen hevur brotið armin, og hann verður neyvan tøkur til dystirnar, sum nú standa fyri framman. Men Jákup Mikkelsen hevur jú verið ein klassamálverji fyri Føroyar ígjøgnum nógv ár, segði landsliðsvenjarin.

Men Jákup Mikkelsen hevur als ikki hugsað tann tankan enn.

– Í løtuni havi eg í øllum førum nógv annað at hugsa um, nú eg eri partur av venjaratoyminum hjá KÍ. Fyri meg er landsliðið eitt avsluttað kapitul, og eg havi ikki hugsað um tann møguleikan seinastu mánaðirnar, sigur Jákup Mikkelsen, sum tó heldur ikki vísur tankanum frá sær.

– Ringir Brian Kerr, so er tað sjálvandi nakað, sum eg taki støðu til. Og sjálvandi er tað ein møguleiki, sum eg ikki kveistri burtur uttan víðari. Í løtuni er hetta tó ikki nakað, sum eg hugsi um, so her og nú dugi eg ikki at svara, um eg eri tøkur ella ikki, sigur Jákup Mikkelsen.

# Rakul vann EM í borðtennis

**Rakul Mikkjalsdóttir úr TBF, sum í vetur gongur á borðtennis-eftirskúla í Danmark, vann um vikuskiftið gull í blandaðum tvímansleiki í borðtennis í einari EM-kapping, sum KFUM í týska býnum, Dresden, var vertur fyri**

BORÐTENNIS
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*



*Rakul Mikkjaldóttir vann um vikuskiftið gull í blandaðum tvímansleiki, silvur í einmansleiki og bronsu í tvímansleiki hjá gentum í einari EM-kapping, sum var í týska býnum, Dresden*

Rakul Mikkjalsdóttir, sum hevur fingið sín borðtennisuppvøkstur í TBF, gongur í vetur á eftirskúla í Danmark, har borðtennis stendur frammarlaga á skránni. Talan er um Tjele Efterskole, sum er einasti borðtenniseftirskúli Danmark.

Eisini gongur Fróði Jensen úr TBF á sama skúla, og tey bæði eru samstundis virkin í felagnum Team Nørreå, sum hoyrir til sama umráði, sum skúlin er í, so tey tann vegin hava møguleika at vera við í teimum kappingum, sum eru har á leiðini.

Bæði tvey vóru tey herfyri tikin út til Oyggjaleikirnar á Álandi, og um vikuskiftið vísti Rakul, at hon skuldi verið væl fyri, tá hon í einari EM-kapping, sum KFUM í týska býnum, Dresden, var vertur fyri, vann bæði gull-, silvur- og bronsuheiðursmerki. Rakul var ein av 13 spælarum úr Danmark, sum vóru við í kappingini saman við spælarum úr Týsklandi, Svøríki og Portugal. Henda EM-kappingin er annaðhvørt ár.

### Trý heiðursmerki

Í blandaðum tvímansleiki komu Rakul Mikkjalsdóttir og ein spælari úr felagnum Søhøjlandet í Silkeborg í finaluna ímóti einum týskum pari. Men í hálvfinaluni vóru tey bæði líka við at snáva, tí í avgerandi settinum vóru tey aftanfyri 6-10, áðrenn tey fingu tamarhald á nervunum og vunnu síðstu seks bóltarnar og finaluplássið.

Í finaluni var aftur talan um týska mótstøðu, men her var eingin ivi, og Rakul og tey vunnu ein tryggan 3-0 sigur. Sostatt er Rakul Mikkjalsdóttir europameistari í blandaðum tvímansleiki í borðtennis.

Hon kom eisini í finaluna í einmansleiki, har hon tó tapti 1-3, so tað gjørdist til silvur. Í tvímansleiki komu Rakul og danska Louise Andreassen í bronsufinaluna, sum tær uppiborið vunnu 3-0, so har var aftur eitt heiðursmerki í hennara lut.

Hesa komandi vikuna skal Rakul Mikkjalsdóttir aftur í eldin í kapping, tá hon saman við fleiri donsum spælarum er við í einari útnorðureuropeiskari kapping, sum verður í grønlendska høvuðsstaðnum, Nuuk.

# Símun Samuelsen upplegg til tvey mál



**Føroyski landsliðsspælarin átti eyðsýndan leiklut, tá Keflavík í gjárkvøldið á heimavølli vann 3-0 ímóti Vali**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í triðja landskappingardystinum í ár eydnaðist tað í gjárkvøldið Keflavík at vinna fulla úrtøku á heimavølli. Høvuðsstaðarfelagið Valur vitjaði á Sparisjóðsvøllinum í Keflavík, og gestirnir vórðu sendir aftur til Reykjavíkar við 3-0 tapi.

Føroyski landsliðsspælarin, Símun Samuelsen, var á vøllinum alla tíðina, og hann átti sín stóra lut í trivaliga heimasigrinum. So mikið uppsettur var hann, at hann frá dómaranum fekk gula kortið fyri eitt fríspark, tá lítil hálvur tími var spældur.

Heimaliðið legði seg á odda longu í sjeynda minutti við máli, sum Guðjón Á. Antoníusson stútaði eftir innlegg frá Símuni Samuelsen. Í 20. minutti økti Hörður Sveinsson um leiðsluna – enn eina ferð eftir fríspæling frá Símuni Samuelsen. Triðja málið skoraði Hörður Sveinsson í 71. minutti.

Sagt verður, at heimaliðið var so nógv grammari, og at sigurin var væl og virðiliga uppiborin. Nú trý umfør eru spæld, er Keflavík á fjórða plássi við seks stigum.